## DAGSINS MEINING

# Ein gomul vinna

Kolavinnan er, sum tað longu hevur verið víst á her í blaðnum og í fakligum bókmentum, ein sera gomul vinna her á landi. Kol hevur verið høgt í Prestfjalli í øldir og í Rangabotni í hvussu so er ein stóran part av 1900 talinum, serstakliga frá trýatiárunum til fimtiárini. Týdningurin av hesari vinnu hevur verið svingandi, men í nevnda tíðarskeiði, serstakliga stríðsárini 1940-45, hevði kolavinnan sera stóran búskaparligan og sosialan týdning. Her vóru til tíðir heilt nógv arbeiðspláss, og landsbúskaparligi týdningurin kundi ikki yvirmetast. Hartil vórðu føroysku heimini hitað við suðuroyarkoli.

Fleiri ferðir upp gjøgnum 20. øld vóru framskygdir menn frammi við djørvum og visionerum ætlanum. Tey eldru minnast royndir hjá vinnulívsmonnum t.d. Richard Thomsen og Gudmund Mortensen, fakfelagsfólki og politikkarum ikki minst P.M. Dam og frá okkara døgum Tormóði Dahl at gera kolavinnuna til eina stórvinnu og til eina av fleiri hornasteinum undir føroyskari orkuframleiðslu. Tann sera bíliga oljan úr Miðeystri koppaði øllum hesum dreymum og visiónum.

Men nú eru oljuprísirnir so høgir, at myndugleikar um allan heim leita eftir alternativum orkukeldum. Vatn, vindur, aldumegi og jarðarhiti - you name it! Kolið er jú eitt hitt mest upplagda alternativið, men hetta evnið hevur tann vansa, at tað ávirkar lofthavið eins nógv, ja, kanska meira enn oljan. Tey, sum seta sítt álit á kol, vilja tó vera við, at tað ber til at skapa framleiðslutilgongdir, ið minka skaðiliga árinið frá kolaorku niður í lítið og einki, og ivaleyst er nakað um hetta. Sama ger. Myndugleikarnir eiga alla tíðina at hava eyguni eftir hesum øki og hava øll hugsandi alternativ í huga. Víst hava vit nógv vatn, nógvan vind og sterkar aldur. Men vit hava altso eisini kolið, sum hevur víst seg vælegnað til upphiting av húsum. Tað er tí upplagt, at landsins myndugleikar seta eina kanning í verk av møguleikunum fyri at nýta føroyskt kol til orkuframleiðslu.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Kvoturnar í Barentshavinum ikki bara ein forering

**Jústinus Leivsson Eidesgaard**
*rithøvundur*
*Hellurnar tann 14. september*



Nú frammi hevur verið í fjølmiðlunum, at kvotur eystanfyri verða handlaðar fyri 40 milliónir krónur hvør, kvotur sum landsstýrið hevur samrátt seg til, og sum nú privatir skúma róman av, so er hetta ikki heilt rætt.

Her rýkur rættuliga nógv av øvund og henda stavar frá óvitinheit. Næsta bindið í bókarøð míni um Kaj snýr seg fyri ein stóran part um fiskiskap eystanfyri.

Føroyingar byrjaðu í tríatiárunum at royna við trolara eystanfyri. Fyrst byrjaðu teir við Bjarnoynna og síðan var farið longur eystur og við Norrakystina, sum norska strondin tá varð kallað. Teir royndu eisini við Svalbard. Sluppir hava av og á fiskað við Bjarnoynna og við Svalbard langt áðrenn hetta.

Tá várfiskurin á Suðurlandinum var av, fóru trolararnir eystureftir og royndu til seint á heysti. Hetta var høvuðsleiðin hjá teimum seinast í tríatiárunum, so kom kríggið og steðgur kom í til stríðslok

Í hvussu er fyri kvoturnar hjá Kjølbro og kvotan frá Enniberg, sum stavar frá Kjølbro, og fyri tað hjá "Vesturvón" er tað ikki galdandi, at landsstýrið einsamalt hevur tryggjað hesum feløgum kvotur.

Við undantakið av árum við fiskaloysi í Barentshavinum hava trolarar hjá Kjølbro javnan verið sjónligir eystanfyri í eitt 70 ára skeið og næstan uttan slit. Og "Vesturvón" hevur eisini verið sjónlig langt áðrenn kvotur komu eystanfyri, also ein eldri "Vesturvón" hjá sama felag.

Uttan søguligu rættindini var ongin kvøta eystanfyri í dag, tað vita øll, sum hava eitt sindur av innliti í hvussu kvotur vera til.

Hesir trolararnir hava skapað søguligu rættindini, at so landsstýrið hevur bøtt um hesi rættindi við at lata russum svartkjaft, sum ongin her heima brúkti allíkavæl, er ein onnur søga. At svartkjafturin í dag hevur fingið størri virði enn í sjeyti, áttati og fyrst í nítiárunum er eisini ein onnur søga. Tað vikar einki við tey søguligu rættindi, sum privatmenn hava skapað.

Gamla felagið hjá Kjølbro hevur sanniliga strítt seg fram til tær tríggjar kvoturnar sum stava frá hesum felag, og sum enn verða troyttar.

Fleiri fólk í Havn eru í dag millióningar, tí onkur fæloysingur av teirra forfedrum fekk ein trøð fyri ein slikk frá tí almenna, velti hesa trøðna og fekk harvið mjólk, kjøt, eplir, røtur og søgulig rættindi til hana, og hesi kunnu nú verða umsett í tíggjutals milliónum og ongin sigur nakað um tað?

Nú ljóðar hetta kanska sum reinur fólkaflokksboðskapur. Tað er so ikki mín uppgáva at tæna nakrari ávísari politiskari sak, eg vísi bert á nøkur søgulig fakta.

# Vil tú royna tann stóra vinningin

**– so send fólkið til hús, og bjóða skipini til sølu.**

**Trygvi F. Guttesen**



Nakað soleiðis sigur verandi skipan til tey vinnulívsfólk, sum hava fingið ókeypis fiskiloyvir.

Hví ikki hava eina skipan sum sigur, at fiskivoyvir skulu latast landsstýrinum aftur, tá ið viðkomandi vinna ikki skal brúka tey meira. Hví ikki lata tí almenna ta aftur, sum tú hevur lánt?

Hvat sigur fólkaflokkurin til, at verandi skipan gevur ávísum partaeigarum 10 - 100 tals milliónir fyri, at eitt gott arbeiðspláss verður nærum heilt niðurlagt ?

Eg eri samdur við fólkaflokkin um, at vit ikki eiga at leggja fleiri eykagjøld á vinnuna. Heldur eiga vit at lætta um hjá vinnuni, soleiðis at fleiri arbeiðspláss verða stovnsett. Men verandi skipan har fiskiloyvini hava nógv størri ávirkan enn áhugin fyri at varðveita góð og gevandi arbeiðspláss, er ein sjúk og skaðilig skipan.

Vit síggja í dag, at vinnan fegin vil geva nógv fyri eitt fiskiloyvi, men vinnan var betur fyri, um hon ístaðin skuldi geva eina minni upphædd til landsstýrið, hvørja ferð fiskiloyvir verða flutt.

Undanførslan hjá Fólkaflokkinum um ikki at broyta verandi skipan tí at fiskivinnan longu hevur 20 % í partafelagsskatti og 35 % um nakað verður tikið út sum vinningsbýti, hevur einki við spurningin at gera.

Nevnda skipan er ikki bara galdandi fyri fiskivinnuna, men fyri øll partafeløg í Føroyum. Hinvegin so er tað bert fiskiskipini, sum fáa tilluta eitt stórt søluvirði ókeypis.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.